# LEIKSKRÁ

## 25. UMFAR

01. NOVEMBER 2020

BLAÐ NR. 15




MYND: PALLI VANG

ARGJA BÓLTFELAG 1973

VÆLKOMIN TIL
DYST Í FLØTUGERÐI

HAVSBRÚN

betri DEILDIN

# Innihald

Dysturin í dag ..... 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ..... 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og AB ..... 10
Leikarin hesaferð ..... 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ..... 18
Undanfarnu umfør ..... 22
ÍF-sangurin ..... 26

**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.

MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



TEKST: EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

So eru vit aftur á heimavølli í Fløtugerði í Fuglafirði. Í dag spælur ÍF sín síðsta heima-dyst í kappingarárinum 2021. Eitt løgið kappingarár, sum als ikki hevur verið sum onnur kappingarár. Korona-kreppan vendi upp og niður uppá heimin tíðliga í ár. Tí byrjaði kappingin væl seinni enn undanfarin ár. Av tí sama er kappingin enn í gongd og verður ikki liðug fyrrenn 7. nov.

Tað er sum sagt í dag, at vit spæla ársins síðsta heimadyst. Hesa ferð er tað AB av Argjum sum vitjar í Fuglafirði. Vit hava spælt 2 ferðir ímóti liðnum av Argjum fyrr í ár. Í 6. umfari vunnu vunnu vit 4-2 á heimavøllinum í Fløtugerði og 27. juli endaði tað 2-2 í 13. umfari úti í Vika á Argjum. Tað vil siga, at higartil í ár, hava okkara reyð/-hvítu dreingir vunnið 4 stig av teimum 23 ímóti argjafressunum.

Tað hevur verið eitt sindur at turbulensi rundanum ÍF-liðið síðstu vikurnar. Onkur spælari er givin og sáttmálin er uppsagdur. Onkur annar hevur fingið „leikbann“ frá venjarunum og leiðsluni í felagnum. Vónandi kunnu vit øll hyggja frameftir frá nú av og leggja ætlanir víðari fyri alt liðið og felagið sum heild. Hesum til gagna fyri leikarar, leiðslu, fjepparum og øðrum áhugaðum.

Leikskráin hjá ÍF takkar fyri í ár. Vit síggjast aftur til kappingarárið 2021. Spennandi verður at fylgja við í í vetur, hvussu hópurin fer at síggja út og hvørjar broytingar verða. Málið má altíð verða at gera tað betri enn undanfarna ár. Kanska verður tað í 2021, at ÍF fer at álvara at blanda seg uppí topp-5. Livst, so spyrst.









SPEKT
løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

samskip




Fønix
Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

26. UMFAR

# HAGTØL

## í Betri-deildini hjá monnum

KELDA: FAROESOCCER

(Hetta umfarið)

### 26. UMFAR

| | |
|---|---|
| 1. nov. 2020 | NSÍ - KÍ |
| 1. nov. 2020 | HB - TB |
| 1. nov. 2020 | EB/Streymur - Skála |
| 1. nov. 2020 | ÍF - AB |
| 1. nov. 2020 | Víkingur - B36 |

(Ársins seinasta umfar)

### 27. UMFAR

| | |
|---|---|
| 7. nov. 2020 | B36 - NSÍ |
| 7. nov. 2020 | Víkingur - ÍF |
| 7. nov. 2020 | AB - EB/Streymur |
| 7. nov. 2020 | TB - Skála |
| 7. nov. 2020 | KÍ - HB |

(Fluttur dystur)

### 22. UMFAR

| | |
|---|---|
| 4. nov. 2020 | KÍ - AB |

### Betri-deildin Menn

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 25 | 21 | 2 | 2 | 76 | 22 | 54 | 65 |
| 2 | KÍ | 24 | 18 | 4 | 2 | 68 | 22 | 46 | 58 |
| 3 | NSÍ | 25 | 18 | 3 | 4 | 53 | 23 | 30 | 57 |
| 4 | B36 | 25 | 18 | 2 | 5 | 71 | 32 | 39 | 56 |
| 5 | Víkingur | 25 | 14 | 2 | 9 | 50 | 40 | 10 | 44 |
| 6 | ÍF | 25 | 6 | 5 | 14 | 32 | 55 | -23 | 23 |
| 7 | EB/Streymur | 25 | 7 | 2 | 16 | 25 | 60 | -35 | 23 |
| 8 | TB | 25 | 3 | 6 | 16 | 17 | 36 | -19 | 15 |
| 9 | AB | 24 | 0 | 7 | 17 | 16 | 69 | -53 | 7 |
| 10 | Skála | 25 | 1 | 3 | 21 | 19 | 68 | -49 | 6 |

TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 16 |
| 2 | Uros **Stojanov** (ÍF) | 16 |
| 3 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 14 |
| 4 | Klæmint A. **Olsen** (NSÍ) | 13 |
| 5 | Adrian **Justinussen** (HB) | 12 |
| 6 | Finnur **Justinussen** (Víkingur) | 12 |
| 7 | Hilmar Leon **Jakobsen** (HB) | 11 |
| 8 | Mikkel **Dahl** (HB) | 11 |
| 9 | Sebastian **Pingel** (B36) | 11 |
| 10 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 10 |

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Daniel **Johansen** (HB) | 19 |
| 2 | Jann **Benjaminsen** (NSÍ) | 12 |
| 3 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 12 |
| 4 | Patrik **Johannesen** (KÍ) | 12 |
| 5 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 12 |
| 6 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 11 |
| 7 | Árni **Frederiksberg** (B36) | 10 |
| 8 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 9 |
| 9 | Mathias **Nygaard** (HB) | 8 |
| 10 | Ole Erik **Midtskogen** (KÍ) | 8 |

# 26. UMFAR

| ÍF | | betri deildin | | AB |
|---|---|---|---|---|
| Tóri T. Traðará (M) | 1 | | 1 | Silas Eyðsteinsson (M) |
| Jens Joensen | 4 | | 2 | Eli Christiansson |
| Karl Løkin (L) | 6 | | 4 | Asbjørn Heðinsson |
| Uros Stojanov | 8 | | 5 | Ragnar Rasmussen |
| Filip Djordjevic | 9 | | 6 | Gert O. S. Drangastein |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 10 | | 7 | Jasper van der Heyden |
| Hákun Edmundsson | 11 | | 8 | Janus S. Samuelsen |
| Hans Jákup Lervig | 12 | | 9 | Tóki á Lofti |
| Jákup N. Olsen (M) | 13 | | 10 | Bjarni Skála |
| Gundur E. Petersen | 14 | | 11 | Hans Jákup Annfinnsson |
| Bogi A. Løkin | 15 | | 13 | Jónas Stenberg |
| Sámal Joensen | 17 | | 14 | Tróndur á Høvdanum |
| Pól Jákup Lundsbjerg | 18 | | 16 | Heðin Stenberg (M) |
| Rói Róin | 19 | | 17 | Bartal S. Petersen |
| Jóhan Petersen | 20 | | 18 | Jákup Pauli Breckmann |
| Tóri N. Olsen | 21 | | 19 | Sørin N. Samuelsen (L) |
| Sjúrður Pauli Nielsen | 22 | | 20 | Filip í Liða |
| Andy Ó. Olsen | 23 | | 21 | Rógvi N. Poulsen |
| Bjarti Højbro | 24 | | 22 | Bjarki C. Nielsen |
| Milos Budakovic (M) | 25 | | 23 | Dánjal Reginsson |
| Jákup í Lambanum | 26 | | 24 | Jón K. Poulsen |
| Petur Meinhard Lundsbjerg | 27 | | 25 | Bjarki V. Mørk (M) |
| Ólavur Larsen | VENJARI | | 27 | Rógvi Skála |
| Hans Jørgen Djurhuus | VENJARI | | 30 | Adeshina A. Lawal |
| Pauli Jarnskor | MÁLMANSVENJ. | | 65 | Hannes Deboes |
| Milan Svojic | HJÁLPARVENJ. | | VENJARI | Símun Samuelsen |
| | | | VENJARI | Tonn Brimsvík |
| | | | FYSISKURVENJ. | Rógvi N. Poulsen |
| | | | MÁLMANSVENJ. | Heðin Stenberg |

ÍF – LIÐLEIÐARAR: TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG
FYSIO: HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

AB – FYSIO: LÍV D. MICHELSEN
LIÐLEIÐARAR: EYÐUN DALSGARÐ, MARTIN B. DALSGARÐ OG KÁRI SKÁLA

| | | |
|---|---|---|
| DÓMARI | Dagfinn Forná | |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Edvard Højgaard | 2. Niklas Petersen |
| 4. DÓMARI | Aron Sofus Vest | |
| EYGLEIÐARI | Jón Kári í Brekkuni | |

BÓLTSTUÐUL: GRÓTLAÐING (BJARTUR LARSEN)






Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
FAROE SHIP
sendistovan


teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
Henning Olsen
Far.: ho 232344
FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo




Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
BANKNORDIK
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo
sansir.fo

20

LEIKARIN

# JÓHAN PETERSEN

**TEKST:** ATLI PETERSEN. **MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ:

**Navn:** Jóhan Petersen
**Føðingardagur:** 13.08.1998
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Havsbrún
**Pláss á vøllinum:** Álop/Vongur
**Yvirtrúgv:** Ikki bangin fyri nøkrum.
**3 orð sum lýsa teg:** 5 Star skills, havi bara ein fót, viljasterkur.
**Frítíðarítriv:** Ikki tað stóra eg spæli nógv playstation, um tað telur.
**Vónir fyri 2021?:** Halda okkum uppi í Betrideildini.

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** B36 í Havn, 21.august 2016 (endaði 4-1)
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá eg var umleið 8-9 ár og spældi við smápiltum.
**Aðrar ítróttargreinar:** Spældi flogbólt, badminton og fótbólt fyrr. Men nú bara fótbólt.
**Minningarríkasti dystur:** U16 tá vit vunnu steypakappingina ímóti NSÍ.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Eyðun Ryggshamar
**Besti fótbóltsleikari:** Dejan Lovren
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Dart ella flogbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Spæla brummu
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Styrkivenjing

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Hotwings og sodavatn
**Slag av tónleiki:** Mær dámar væl Nirvana og tílíkt.
**Sjónvarpssending:** How i met your mother
**At slappa av:** Netflix og okkurt etandi aftur við.
**Troyggja nr.:** 20
**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Dimitar Berbatov
**Sjónvarp/filmstjørna:** Neil Patrick Harris
**Besta bók/blað:** ehm....
**Stuttligasti persónur:** Kevin Hart
**Stuttligasti í hópinum:** Tóri N. Olsen

**Besti ÍF áskoðari:** Gutti Hansen




## FAKTA UM JÓHAN

Um ein skal trúgva Faroesoccer, so er Jóhan júst byrjaður, tí hann er ikki skrásettur fyri nakran dyst yvirhøvur.

Hevur nógv fótbóltsgen í familjuni. Vert er at nevna at hann er beiggi Pól Magnus, sum hevur spælt við besta liðinum og eisini Anniku, sum hevur m.a. hevur spælt fleiri ár við KÍ kvinnunum, sum hava vunnið nógv tey seinastu mongu árini.

Stillar upp til kommunuvalið 2020, har hann er á lista Á


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111




A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR
ESAB
FROZEN
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

## Betri-deildin Kvinnur

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 20 | 18 | 2 | 0 | 55 | 17 | 38 | 56 |
| 2 | NSÍ | 20 | 8 | 6 | 6 | 38 | 29 | 9 | 30 |
| 3 | HB | 20 | 7 | 6 | 7 | 38 | 31 | 7 | 27 |
| 4 | B36 | 20 | 6 | 5 | 9 | 23 | 31 | -8 | 23 |
| 5 | ÍVB | 20 | 5 | 4 | 11 | 26 | 40 | -14 | 19 |
| 6 | EBS/Skála | 20 | 4 | 1 | 15 | 15 | 45 | -30 | 13 |

## ÍF ynskir

**KÍ TIL LUKKU VIÐ FM,**

**NSÍ TIL LUKKU VIÐ SILVURINUM**

**HB TIL LUKKU VIÐ BRONSUNI**

## TOPP 10
### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Evy á **Lakjuni** (KÍ) | 17 |
| 2 | Heidi **Sevdal** (NSÍ) | 12 |
| 3 | Jacoba **Langgaard** (ÍVB) | 7 |
| 4 | Julia Naomi **Mortensen** (HB) | 7 |
| 5 | Kára **Djurhuus** (HB) | 7 |
| 6 | Olga Kristina **Hansen** (B36) | 7 |
| 7 | Ása **Carlsen** (HB) | 6 |
| 8 | Jensa **Tórolvsdóttir** (ÍVB) | 6 |
| 9 | Laila **Pætursdóttir** (NSÍ) | 6 |
| 10 | Rannvá **Andreasen** (KÍ) | 6 |

## TOPP 10
### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Evy á **Lakjuni** (KÍ) | 9 |
| 2 | Durita **Hummeland** (KÍ) | 8 |
| 3 | Heidi **Sevdal** (NSÍ) | 8 |
| 4 | Julia Naomi **Mortensen** (HB) | 8 |
| 5 | Emma **Hansdóttir** (B36) | 7 |
| 6 | Jensa **Tórolvsdóttir** (ÍVB) | 7 |
| 7 | Sara **Lamhauge** (HB) | 7 |
| 8 | Elin Maria **Isaksen** (HB) | 6 |
| 9 | Kára **Djurhuus** (HB) | 4 |
| 10 | Rannvá **Andreasen** (KÍ) | 4 |



Bilasølan

Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo

.com/bilasolan .com/bilasolan



# Leiðandi reiðarí
# í norðurhøvum




VARÐIN P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

**Vit takka fyri stuðulin**

multiputl

Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …

tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo






UNDANFARNA UMFAR

25. UMFAR

TEKST: EIVIN BREIÐASKARÐ - MYND: PALLI VANG

# ÍF - B36

**Ein løgin kennsla at vita, at mikukvøldið 28.okt. spældi okkara ÍF-lið heimadyst í Klaksvík ímóti B36. Orsøkina kenna vit øll, og at kjakast víðari um manglandi ljósviðurskifti við vøllin í Fløtugerði, fara vit ikki at brúka tíð uppá her.**

ÍF stuðlarnir vóru nógvir møttir til dystin við Djúpumýrar, og tað vóru ikki sørt av klaksvíkingum, ið komu til dystin, og teir stuðlaðu fuglfirðingum. Væl vistu fuglfirðingar, at hetta fór at verða ein torførur dystur, tí mótstøðuliðið liggur millum fremstu liðini, nú kappingarárið er um at verða liðugt.

So skjótt dysturin varð bríksladur í gongd, settu B36 seg á dystin, spældu góðan fótbólt og vóru mangan um at fáa mál, men ÍF-ararnir vóru raskir og ágrýtnir og góvu B36 skarpan gang. Hóast mong álop við nógvari ferð, so megnaðu fuglfirðingar at steðga so at siga hvørjum einasta álopi, og ta ferðirnar teir komu gjøgnum verjuna, stóð málverjin sum ein múrur, ið eingin bóltur slapp ígjøgnum.

So hendi tað, ið fáur væntaði, at íF-ararnir fara í álop, og ungi spælarin Poul Jákup Lundsbjerg smekkar bóltin í málið, ið málmaðurin hálvbjargar, ið fer útaftur til Uros, ið heilfluktar bóltin upp í handaru stong. Enn eitt vakurt mál frá Uros.

So hendi tað, at brotspark varð dømt til B36, tí fuglfirðingar skuldu hava skumpað Pingel um koll inni í brotsteignum. Hesum mótmæltu okkara spælarar, men tað hjálpti einki, og B 36 skoraði sítt fyrsta mál, so varð javnleikur 1-1.

Javnleikurin var til bert ein minuttur var eftir av dystinum, tá tað eydnaðist B 36 at fáa sítt næsta mál, og vunnu sostatt dystin við úrslitinum 2-1.

Um okkara ÍF lið skal sigast, at tað stríddist væl í dag og legði nógv fyri at fáa eitt gott úrslit. Verjuspælið riggaði væl í dag, verjan spældi skilagott og var ótroyttilig.

Miðvøllurin og álopið spældu somuleiðis skilagott.

Uros er spælarin, ið eitt mótstøðulið altíð hevur ampað av, tí hann hevur nakrar serligar dygdir.

Ein ungur spælari, ið gjørdi rættiliga vart við seg í dag, var Pól Jákup Lundsbjerg, ið megnaði ferð eftir ferð at steðga B 36 álopunum. Eisini hann hevði eitt brandskot upp á B 36 málið, ið málmaðurin hjá B 36 mátti lata fara til hornaspark.

Verður tikið samanum, so var B36 tað betra liðið, men okkara lið vísti so sanniliga sínar dygdir við sínum vilja, ágrýtni og skilagóðum spæli,sum kann styrkjast uppaftur meira til komandi kappingarár.



# BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044

Alt kann gerast



## RVtøkni

- Góðkendur Elinnleggjari
- PLC Menning
- SCADA Menning
- Serútgerðsveitari
- Signal Viðgerð
- Vinnulig Elinnlegging

Stangavegur 14 | Postnr. 700 | Klaksvík |Tlf: 230 230 | T-Post: rv@rvt.fo |www.rvt.fo


**Vit takka fyri stuðulin**


MOWI

FAROE ISLANDS

# RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY **NATURE**



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka.
Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum
og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum
ger hana til heimsins besta laks.
Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

**RINKA.FO**

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

TAKKAR FYRI STUÐULIN